

## Halgir hevur valt at gevast

Halgir Dahl Olesen, sum helst hevur verið besti spælarin hjá H71 í nógv ár, hevur nú valt at gevast við hondbóltinum. Hann hevur drigist við ein knæskaða í langa tíð og hevur fingið boð um at gevast. Nú hevur Halgir valt at taka hetta til eftirtektar. Hann sigur tó, at hann møguliga fer at spæla onkran dystin í ár, men tað er bert, um liðið hevur mangul uppá fólk.

Halgir er í staðin vorðin hjálparvenjari hjá besta mansliði hjá H71. Saman við Kára Durhuus skal hann nú spæla nýtt og ungt fólk inná H71 liðið.

ATLANTIC AIRWAYS
HONDBÓLTUR MENN

### FAKTA – H71 menn

**Stovnað:** 1971
**Formaður:** Sunnuvá Jacobsen
**Venjari:** Kári Durhuus og Halgir Dahl Olesen
**FM-heiti:** Einki

# Byggja eitt nýtt lið

**Hoyvíkingar hava mist nógvar av størstu profilunum frá í fjør. Nú byggja teir eitt nýtt lið upp. Vørumerkið skal vera skjótur og álopskendur hondbóltur**

HONDBÒLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Kári Durhuus og Halgir Dahl Olesen hava fingið til uppgávu at standa á odda fyri H71 komandi kappingarár. Uppgávan er møtumikil, tí H71 hevur verið fyri stórum broytingum. Nógvir av royndu leikarunum eru givnir, og nú skulu ungir spælarar taka yvir. Hetta eru Kári og Halgir sera spentir til.

### Stílurin skal broytast

H71 hevur verið kent fyri tí hørðu og kontantu 6-0 verjuna og eitt stórt álop, har bakspælararnir hava havt stóra skotstyrki. Skotstyrkin er har enn, men spælararnir á bakplássunum eru minni og kvikari, og hetta halda teir báðir venjararnir vera tað rætta: "Nú hava vit mist teir flestu av stóru og tungu bakspælarunum, og smærri kvikari leikarar hava tikið við. Tað ger, at okkara álop fer at byggja á skjótari spæl, meðan verjan kanska fer at vera meir álopssinnað."

### Venjararnir trúgva uppá sínar leikarar

Sjálvt um tað verður eitt rættiliga nýtt og órutinerað H71-lið, vit fara at síggja, so hava báðir venjararnir stórt álit á sínum spælarum: "Vit fara inn á vøllin fyri at vinna hvønn dyst, men tað er púra greitt, at hetta verður ringt. Málið er at vinna eina medalju, men av tí at liðið er so ungt, so er tað eingin katastrofa, um vit ikki megna hetta," sigur Halgir. Kári leggur afturat: "Vit trúgva upp á okkara leikarar, og vit skulu allir fara út á vøllin at hava tað stuttligt. Sannleikin av tí heila er, at vit einki hava at tapa. Okkara menn kunnu fara út á vøllin uttan nervar, tí tey flestu vænta ikki tað stóra av okkum. Eg vænti tó sjálvur, at hetta liðið kann yvirraska fleiri av hinum liðunum."

### Rutinan kann gerast ein trupulleiki

Sjálvt um báðir venjararnir hava góðar vónir til komandi kappingarár, so eru teir báðir skjótir at viðganga, at liðið manglar eitt sindur av rutinu: "Tá



*- Vit hava mist fleiri av stóru tungu bakspælarunum. Hetta ger, at álopið fer at byggja á skjótari spæl, meðan verjan fer at vera meir álopssinnað og ágangandi.*

eitt lið missir so nógvar royndar leikarar, so hevur hetta sjálvandi ávirkan. Teir ungu leikararnar mangla royndir, og hetta fer møguliga at síggjast í nøkrum dystum. Vit vóna tó, at teir royndu leikararnir, sum eru eftir í hópinum, fara at taka ábyrgd, so hesin trupulleikin ikki verður óneyðuga stórur."

Teir leggja tó afturat, at ein tann týdningarmesti parturin fyri eitt gott kappingarár er kontraspælið. Teir vilja hava, at kontraspælið skal rigga, tí tað er umráðandi hjá einum so ungum liði at fáa nøkur løtt mál, tí hetta er júst vegurin at fáa ungar leikarar í gongd.

### Vænta eina harða kapping

At enda spurdu vit báðar venjararnar, hvat teir vænta av kappingini sum heild. Teir vóru báðir samdir í, at Kyndil fer at vera ringt at basa. Teir hava ein góðan og breiðan hóp og tykjast teir hava tað sterkasta liðið í løtuni. Eftir hetta vóru teir eitt sindur í iva: "Tað er ringt at meta um, hvat lið er tað sterkasta eftir Kyndil. VÍF er altíð væl við, og liðið hjá kollfirðingum sær spennandi út, men teir eru bara ov óstøðugir Hvussu er við hinum liðum tora vit ikki heilt at úttalað okkum um. Kanska vit megna at sníkja okkum upp á eitt triðja pláss."

Tað er lítið at ivast í, at bæði Kári Durhuus og Halgir Dahl Olesen eru spentir uppá uppgávuna við unga H71-liðnum, og tað er ikki sørt, at teir hava stórar vónir til liðið. Men sum teir báðir tóku til: "Liðið er so mikið ungt, at verður tað ikki í ár, so verður tað í næsta ár."

# – Allir mans mugu taka ábyrgd

**"Fleiri av royndu leikarunum eru givnir, so nú spæla vit eitt yngri lið inn. Tað er týdningarmikið, at vit ikki seta ov stór krøv til okkum sjálvar."**

HONDBÒLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hetta sigur Levi Nybo, sum telist millum teir royndu leikararnar á H71 liðnum, hóast sín unga aldur. Levi hevur í nógv ár verið ein tryggur síðsti skansi hjá hoyvíkingum, og nú fleiri av eldru leikarunum eru givnir, fara teir at hava enn størri tørv á góðu evnunum hjá Leva í málinum.

### Spæla skjótan hondbólt

Levi sigur, at nógv er broytt fram til komandi kappingarár. H71 hevur mist nógvar leikarar, so tað verður eitt rættiliga nýtt lið, vit fara at síggja. Serliga bakketan verður øðrvísi mannað, og hetta fer eisini at ávirka spælistílin hjá liðnum nakað: "Vit hava í nøkur ár spælt við stórum skjúttum í bakketuni, men nú eru flestu av teimum ikki í felagnum longur. Tí mugu vit geva yngri kreftum møguleikan, og hetta ger, at okkara álopsspæl fer at vera nógv skjótari, enn tað hevur verið áður."

Í sama viðfangi sigur hann, at liðið eisini er farið at spæla við fleiri kontraálopum, og hann viðgongur, at hetta setir stór krøv til ein málmann.

### Allir mans mugu taka ábyrgd

Málverjin sigur tað eisini vera týdningarmikið, at allir mans taka ábyrgd: "Tá vit spæla eitt so ungt og óroynt lið til, so er tað týdningarmikið, at menn ikki eru bangnir fyri at taka ábyrgd. Ikki bert leikararnir við nógvum royndum, men eisini teir ungu, tí teir skulu jú bera liðið víðari um nøkur ár."

Levi leggur afturat, at av tí at so nógvir eru farnir burturav, so er breiddin ikki tann heilt stóra. Tískil hava hoyvíkingar ikki ráð at missa ov nógvar leikarar.

Levi endar við at siga, at sjálvt um fólk ikki vænta so heilt nógv av H71, so trúgva allir leikararnir uppá, at H71 kann fáa eitt gott úrslit í ár: "Ja, vit fara út fyri at vinna hvønn dyst, og eg haldi heilt víst, at allir leikararnir trúgva upp á seg sjálvur og H71 sum eitt lið, so tað sær spennandi út."